# Fýra uppskot –






**Allir viðingar ynskja sær tryggan farveg av bygdini, men spurningurin hevur verið, hvør var rættasta loysnin í hesum máli.**
**– Eg tók eitt kort, ein blýant og eina lineal og gjørdi síðani fýra uppskot um tunnilssamband til Viðareiðis, sigur Dánjal Lydersen**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** "Av tí at verandi vegur er smalur, ótíðarhóskandi, og grót ofta kemur á vegin, er ynski um at fáa ein tunnil og veg millum hesar bygdir".

Soleiðis verður tikið til á heimasíðuni hjá Landsverki, tá talan er um vegin millum Viðareiði og Hvannasund.

Fyri viðingar er hetta einasta sambandið við umheimin, og tí ynskja fólk sjálvandi at hetta sambandið er so gott sum tilber.

Tey sum av og á koyra eftir vegastrekkinum hugsa kanska ikki so nógv um tað, sum tey ið gera hetta fleiri ferðir um dagin. Vegurin er snøgt sagt ikki egnaður til tørvin, ið settu verður í dag.

Kommunan hevur somuleiðis gjørt vart við hetta ynskið, og nú er mangt sum bendir á, at viðingar kunnu síggja fram til eina loysn á hesum vandamáli.

Hjá Landsverki hava tey nevniliga arbeitt við at kanna, um tað ber til at gera ein tunnil, hvar hann skal liggja og síðani virka fyri at ein tíðarætlan verður gjørd.

Men tað eru kortini tey fólkini sum hava sett sær sjálvstøðugt fyri at kanna og vísa á loysnir í hesum máli.

Ein teirra er Dánjal Lydersen á Viðareiði, sum hevur gjørt ikki færri enn fýra uppskot um, hvar tunlar kundu liggja í framtíðini.

– Eg havi gjørt hetta av mínum eintingum – fyri líkasum at koma við nøkrum konstateringum, sigur Dánjal við Sosialin.

## Kanningar

Hjá Landsverki hava tey longu gjørt sínar kanningar av málinum.

Inni í Dølum á einum staði, tey nevna í Middali eru kjarnuboringar gjørdar og er ein kjarni sendur til Jarðfeingi, har hetta tilfarið skal kannast nærri.

Sambært teirri ætlan, sum arbeitt verður við at fyrireika í løtuni, kemur ein komandi tunnil til Viðareiðis at ganga frá einum varða norðanfyri Hvannasund og inn í Dalar.

Hesin tunnilin verður 2300 metrar til longdar, samstundis sum ein roknar við eini vegagerð sum verður umleið 4000 metrar til longdar.

Av Landsverki verður upplýst, at í ár eru játtaðar 500.000 kr. til hesa verkætlanina og eina aðra ætlan um tunnil til Depils.

Sligið verður kortini fast, at ógjørligt er at siga nakað um tíðarætlanina, tí spurningurin er um nøkur játtan fæst til hana.

Hesar báðar ætlanirnar hava kortini ikki tikið hugin frá viðingum um at koma við sínum hugskotum um, hvussu ein best kann tryggja bygdarfólkinum ein tryggan veg til umheimin.

**Her var ikki talan um uppskot, men meiri um fýra konstateringar av, hvar tunlarnir møguliga kundu verðið gjørdir**

## Omanlop

Dánjal hevur fylgt væl við í tosinum og tjakinum um møguligar tunlar til heimbygd hansara.

Hann hevur sjálvur verið formaður í bygdarráðnum, eins og

## FAKTA

### Tunnil til Viðareiðis

**Dánjal Lydersen hevur gjørt fýra uppskot um, hvussu ein kann leggja ein tunnil til Viðareiðis.**

1) **Norðanfyri Hvannasund frá einum staði tey nevna á Varða til Innanfyri garðin í Bug ella inni í Leiti (3,9 kilometrar)**
2) **Norðanfyri Hvannasund frá einum staði tey nevna á Varða til Undir Fossum inni í Dølum (2,4 kilometrar). Hetta er í stóran mun sama uppskot sum Landsverk arbeiðir við í løtuni.**
3) **Norðanfyri Hvannasund frá einum staði tey nevna á Varða inn í Viðareiðis bygd (4,9 kilometrar)**
4) **Norðanfyri Hvannasund frá einum staði tey nevna á Varða til Stakkararætt eystantil á Viðareiði (4,6 kilometrar)**
5) **Eitt fimta uppskot lá honum eisini í huga: Ein tunnil úr Hvannasundi inn í Viðvík og síðani inn í Dalar á Viðareiði.**